TIL ARBEIÐIS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Leo Poulsen




*Jóna Petra Ebbadóttir er skopuningur, men býr í Sørvági. Tað gera tey allarflestu, sum arbeiða á Støðini á flogvøllinum*

## FAKTA

**Navn:** Jóna Petra Ebbadóttir
**Starv:** Traffik assistent
**Starvstíð:** 7 ár
**Besta við starvinum:** At møta nógvum fólki
**Ringasta við starvinum:** Haldi ikki tað er nakað ringt

# Kann ikki ímynda mær annað starv

**JÓNA PETRA EBBADÓTTIR** ARBEIÐIR Á STØÐINI Á **FLOGVØLLINUM**, OG TAÐ UMFATAR EISINI CHECK-IN OG **TAXFREE** HANDILIN. Á STØÐINI HITTA TEY SJÁLVANDI NÓGV FÓLK, OG **AVBJÓÐINGARNAR** ERU MANGAR – IKKI MINST MÁLSLIGA, MEN **JÓNA PETRA** KUNDI IKKI HUGSA SÆR AT ARBEITT **AÐRASTAÐNI**

Kundarnir eru altíð nógvir við fráferð og komu hjá flogførum á flogvøllinum vesturi í Vágum. Og tá er ofta nógv at gera á Støðini, sum tey kalla kundadiskin hjá Atlantsflog á flogvøllinum.

- Vit hjálpa og vegleiða fólki á ymsan hátt. Millum annað taka vit móti gjaldi fyri ferðaseðlar frá fólki, sum ynskja at gjalda kontant, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Í øðrum førum printa tey úr ferðaskráir og annað fyri fólk, ið ikki sjálvi hava teldu og printara heima.

- Avgreiðslan umfatar bæði flogfør og tyrlur, og uppgávurnar eru bæði mangar og ymiskar. Eitt nú umsita vit ta frakt, sum fer við flogførunum, og flogskipararnir koma altíð inn á Støðina at kunna seg um, hvussu nógv frakt er við, og um hon fæst í flogfarið, antin vegna tyngd ella vavi, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Tað eru eini 15 fólk knýtt at Støðini, og øll eru tey konufólk.

- Í løtuni hava vit fólk inni til upplæring, tí tað er altíð meira at gera um summarið, og tá eru vit eisini fleiri fólk til arbeiðis. Talan er um summarstørv, sum vara frá mai til einaferð út í september, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Sjálv byrjaði hon í starvinum fyri sjey árum síðani, og henni dámar stak væl á flogvøllinum.

- Flogvinnan er ein sera spennandi vinna, og eg hugsi ofta, at eg kundi ikki ímynda mær nakað annað arbeiði, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

### Fjølbroyttir dagar

Tað krevst ein breið vitan hjá teimum, ið arbeiða á Støðini.

- Tú skal helst kunna svara teimum spurningum, sum viðskiftafólkini hava, og tað er eitt krav, at tú dugir enskt og danskt umframt føroyskt. Sjálv eri eg hálvur íslendingur og dugi tí íslendskt eisini, og annars brúka vit eisini norðurlendskt mál, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Um sumrarnar hava tey seinastu árini havt fólk inni, sum duga franskt, og soleiðis verður eisini í ár.

- Truplasta fólkaslagið at samskifta við, eru russar, tí teir duga sum oftast bara russiskt. Og so má samskiftið fara fram sum best við faktum og teknum, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

So talan er um nógvar og spennandi avbjóðingar í einum fjølbroyttum gerandisdegi, sum ongantíð er hin sami.

- Arbeitt verður í vaktum, og talan er um fýra ymiskar. Cargo, ið tekur sær av fraktini, arbeiðir frá 10 til 18, avgreiðslan er frá 7 til 15, og somu tíð er Støðin opin. Check-in er so opið tá flogførini koma og fara, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

### Nógvar uppgávur

Tað eru altíð tvær til arbeiðis á Støðini.

- Onnur tekur sær av avgreiðsluni og teimum viðskiftafólkum, sum hava brúk fyri hjálp og vegleiðing, meðan hin tekur sær av samskiftinum við flogførini. Og har er nógv at halda stýr á, bæði í samband við check-in og frakt, og hvat pláss yvirhøvur er fyri í flogfarinum, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Mjørkadagarnar eru teir mest spennandi.

- Tá er sjálvandi ivi um, hvørt tað ber til hjá flogførunum at lenda, og tá fáa vit ofta túsund spurningar, og sum oftast teir somu. Tá er uppgávan at tøla fólk, so tey ikki gerast friðleys. Og annars syrgja fyri, at alt glíður, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Hon sigur, at tað kemur sjáldan fyri, at feilir eru í eitt nú ferðaseðlunum frá teirra síðu.

- Ferðaseðlar verða seldir um næstan allan heim, og tí er tað bert ein lítil partur, sum vit sjálvi selja. So tá feilur er í bíleggingum, er tað sjáldan, at vit fáa gjørt nakað við tað, tí bíleggingarnar eru gjørdar aðrastaðni, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Og av tí sama hava tey á Støðini ikki »óbehagiligheitir« av illum kundum.

- Nei, tað kemur ógvuliga sjáldan fyri, og skuldi tað hent, eru starvsfólk hjá Vága Floghavn skjót til, so vit kenna okkum ongantíð ótrygg, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

### Vítt samskifti

Vágafólk siga altíð, at tað ongantíð er mjørki í Vágum, men tað er so ein sannleiki við modifikatiónum.

- Tað verður bert roknað sum mjørki, tá neyðugt er at avlýsa flogferðir, men hendir tað, er tað uppgávan hjá okkum her á Støðini at finna út av, hvar pláss er at yvirnátta hjá ferðafólkunum, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Í Føroyum hava tey fasta avtalu við eitt hotel, men er ikki lendandi í Vágum, skal Støðin finna út av, hvar pláss er fyri ferðafólkunum, og so gera flogskipararnir av, hvar tað er skjótast og lagaligast at flúgva.

- Tað kann verða alt frá Stavanger, Bergen, Reykjavík ella Egilsstaðir og Keflavík, so tað eru spennandi løtur, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Men hóast tær verða upplærdar á Støðini til mangt og hvat, so er tað eitt, tær ikki verða lærdar, og tað er at tosa boð í anlegginum á flogvøllinum. So hví ljóða tær allar so eins?

- Eg haldi, at tað kemur bara av sær sjálvum. Vit leggja okkum bara upp at tí, sum fólk vanliga hoyra í hátalarunum, sigur Jóna Petra Ebbadóttir.

Aftan á sjey ár á Støðini eru sjálvandi løtur, ið hava brent seg í minni. Men eitt tað mest spennandi, ið Jóna Petra Ebbadóttir minnist aftur á, er tíðarskeiðið, tá felagið opereraði við sjey flogførum og trimum tyrlum.

- Tað var ein sera spennandi tíð, serliga upp undir jól. Men tað, sum vit gleða okkum einamest til nú, er tá nýggja Airbus flogfarið kemur til landið í mars mánað næsta ár, sigur Jóna Petra Ebbadóttir, sum um stutta tíð fer í barnsburðarfarloyvi.